





# JÓLASTÁSIÐ SKAL FINNAST





Nú nærkast jólini av álvara, og jólastásið skal finnast. Summi eru í góðari tíð, meðan onnur útseta tað sum longst at finna tey fínu klæðini, sum tey vilja keypa í sambandi við høgtíðina.

Glitur er sera vælumtókt, og flestu kvinnur munnu í dag eiga okkurt klædnaplaggið, sum glitrar. Solveig er íklødd ein vakran svartan kjóla. Svart er altíð vakurt og flott og er ímyndin av tí klassiska. Men kjólin hjá Solveig brýtur tó frá tí klassiska við glitrinum, víða niðurdeilinum og einfalda stroppinum rundan um hálsin. Ein sera vakur kjóli, sum hóskar stak væl til ungar kvinnur um høgtíðina.

Sunneva er í einum svørtum buksum, sum er eitt must fyri flestu gentur og kvinnur í dag. Blágrøni toppurin, sum Sunneva er í, kundi verið í flestu litum, tí snøgt sagt allir litir kunnu nýtast til svart. Toppar er eisini eitt plagg, sum øll konufólk brúka. Ein toppur er eitt plagg, sum kann nýtast árið runt. Um summarið síggjast nógvar kvinnur ganga í berum toppi, meðan sami toppur innan fyri ein jakka, vest ella troyggju kann geva einum klædnasetti eitt heilt nýtt look. Belti, taskur og skógvar spæla eisini ein týðandi leiklut í heildarmyndini.

Báðar genturnar eru í klæðum frá klædnahandlinum Fljóðið í Tórshavn, sum hevur jólastásið til flest allar kvinnur.